# Føroyskir næmingar hava góðan arbeiðsmoral

*-Føroyingar eru sum heild nógv betri fyri at fara undir eina oljuvinnu, enn norðmenn vóru tað fyri 30 árum síðani sigur Arild Saasen, boriserfrøðingur hjá Statoil, og vísir m.a. til undirvísingarverkið, ið hevur hevur lagt lunnar undir komandi kolvetnisútbúgvingar longu áðrenn oljuleiting er byrjað*



*Arild Saasen undirvísir her á skeiði á Náttúruvísindadeildini í Nóatúni. Mynd Jens K. Vang*

JAN MÜLLER

Hann er ovfarin av, hvussu nógv føroyingar longu hava fingið burtur úr fyrireikingunum til eina komandi oljuvinnu og her ikki minst á útbúgvingarøkinum. Hann eitur Arild Saasen og starvast í dag sum leiðari av borideildini hjá Statoil í Stavanger. Frammanundan hevur hann undirvíst á Høgskolen í Stavanger, í kolvetnisfakum. Tað var í hesum sambandi, at hann fekk samband við Føroyar. Arild Saasen var millum teirra, sum løgdu lunnar undir samstarvið millum føroyskar skúlamyndugleikar og Høgskolen í Stavanger.

Ein avleiðing av samvinnuni eru tey boriskeið, sum Oljuútbúgvingarsamtakið skipar fyri í næstum. Síðani er eisini samstarv á hægri støði millum eitt nú Fróðskaparsetrið og Høgskolen í Stavanger.

Arild Saasen var nú um dagarnar í Føroyum fyri at undirvísa á skeiði á Náttúruvísindadeildini fyri næmingum, ið lesa til kolvetnisverkfrøðing og øðrum áhugaðum.

Sosialurin hitti hann í Nóatúni í vikuni. Arild Saasen dylur ikki fyri, at hann er ein av teimum, sum hevur fingið serstakan áhuga og als fyri Føroyum og at hann er bæði stoltur og fegin um at hava verið við frá byrjan at byggja upp frálæru innan kolvetni. Arild Saasen var við fyri tveimum árum síðani, tá samskifti tók seg upp millum føroyingar og olju- og skúlamyndugleikar í Stavanger.

### Fylgir væl við

Arild Saasen sigur seg fylgja væl við gongdini í Føroyum, nú tað nærkast 1. útbjóðing. Sjálvur heldur hann Føroyar eru eitt sera spennandi men eisini eitt trupult umráði reint tøkniliga at arbeiða í og teljast Føroyar tí eisini millum hárisikoøkini í heiminum. Tvs. at um somu tíð sum tað er sera áhugavert at arbeiða her er tað eisini vágiligt. Her finnast avbjóðingar, sum man ikki finnur á norskum øki, og her kemur serstaka føroyska basaltið inn í myndina.

Norðmaðurin heldur, at tað er sera umráðandi hjá føroyingum at útbúgva síni egnu fólk - ikki minst fyri at skilja hesa nýggju vinnuna. Hann heldur ikki tað er nøkur katastrofa fyri teir føroyingar, sum fáa sær útbúgving innan kolvetnivinnuna, um tað skuldi víst seg, at eingin olja er her. - Skuldi tað óhepna hent, at man ikki finnur olju við Føroyar, so kunnu føroyingar við kolvetnisútbúgvingum brúka tær bæði í norskum og bretskum øki. Undir øllum umstøðum er tað ikki ein burturspilt útbúgving.

### Føroyingar betri fyri enn norðmenn

Arild Saasen heldur, at føroyingar eru betri fyri, enn tá norðmenn byrjaði eina oljuvinnu, tí man er longu farin í gongd at útbúgva fólk, áðrenn oljuleitingin er byrjað, bæði á universitetsstøði og á tekniskum skúlum. Tvs. at føroyingar byggja upp eina kompetansu, longu áðrenn oljuvinnan fær fótin fyri seg. Støðan í Noregi á sinni var tann, at henda kompetansan mátti byggjast upp samtíðis sum vinnan varð bygd út. Hetta fær so eisini tað positivu avleiðing, at møguligt er at skipa sjálvt lógarverkið í Føroyum nógv betri, enn støðan var í Noregi, tá oljuvinnan tók seg upp har.

Tá tosað verður um negativar og positivar avleiðingar av eini oljuvinnu, heldur Arild Saasen, at tað er sera umráðandi at hava eftirlit við so nógvum sum til ber, samtíðis sum ein eigur at ansa eftir ikki at lata feløg oa. byggja út infrastruktur ol. sum so seinni kemur at liggja sum ein spøkilsisbýir.

Arild Saasen er bjartskygdur í so máta, tí føroyingar hava møguleika at læra av norðmonnum, ið nú koma inn í eina endafasu. Tvs. at føroyingar kunnu síggja eitt sindur longur fram, enn norðmenn kundu, tá oljuvinnan byrjaðu har.

### Góðan arbeiðsmoral

Nú Arild Saasen hevur undirvíst bæði føroyingum og norðmonnum spurdu vit hann, hvussu støðið er í Føroyum!

-Føroyskir studentar og mæmngars hava ein nógv betri arbeiðsmoral enn teirra norsku javnlíkar. Fyri mær tykist tað sum føroyingarnir hava eina generella bakgrund, sum er góð og taka føroyingar til sín vitan uppá eina góðan máta.

Tá vit spyrja hann, hvørjar greinar innan kolvetni føroyingar eiga at leggja seg eftir, so ivast Arild Saasen í, um tað er rætt av føroyingum at leggja seg ov nógv eftir at útbúgva seg innan reservoirtøkni. Heldur eigur at verða hugt eftir bori- og brunntøkni og eisini framleiðslu. Hann undirstrikar, at hetta hevur einki við arbeiði hansara hjá Statoil at gera. Hetta er hansara persónliga hugsan.



*Frá skeiði innan kolvetnisvinnu í Nóatúni. Mynd Jens K. Vang*



## HYGG & HOYR

Fríggjadagur 11. februar

# Skaldsøgur og náttartøgn

*Rás 2 fer nú undir at lesa upp skaldsøgur, og kvirran, sum hevur valdað seinastu næturnar, fer at halda fram í einar tríggjar mánaðir ella so*

JÁKUP MØRK

Rás 2 hevur í tíðindaskrivi boðað frá, at teir í næstum fara undir at lesa upp skaldsøgurnar »Búrið« og »Til lívið«, sum báðar eru skrivaðar av Ruth Minsky Sender.

Ruth Minsku Sender býr í dag í New York, har hon er lærarinna í jødiskari mentan og søgu. Hetta sæst eisini aftur í skaldsøgunum báðum, sum snúgva seg um teir ræðuleikar, sum jødiska fólkinum var fyri, tá týskarar settu sær fyri at týna hetta fólkaslagið, og teir trupulleikar, sum seinni vórðu avleiddir av hesum

Fyrra bókin varð útgivin í 1986 og seinna í 1998. Anna Smith, sála, týddi bøkurnar til føroyskt, og verður tað væl kenda røddin hjá Sonna Smith, sum fer at bera orðini út til lurtaraskaran.

### Búrið

Í »Búrinum« fylgja vit 16 ára gomlu jødisku gentuni, Tivu, frá tí at týskararnir stongdu jødarnar inni í ghettoum í polsku býunum, til allir jødarnir vórðu fluttir í týningarlegur í Eysturproysalandi. Henda sanna frásøgning lýsir ikki bara nágreiniliga ræðuleikarnar í nasistisku týningarlegunum, men sigur okkum eisini frá menniskjum, ið halda saman og eiga ófatuliga styrki, kærleika og vilja til at liva.

### Til lívið

Tá ið russar koma og fría jødar úr arbeiðsleguni, Gratenort, vendir nú 19 ára gamla Riva sær til vinkonurnar og sigur: »Vit eru frælsar«. Enn hevur hon onga hóming av, hvussu long og illgongd leiðin til frælsið er.

Riva fer beinan vegin til heimbýin Lodz í Póllandi, í vón um at finna skyldfólk ella vinir, sum enn eru á lívi. Hon finnur eingi skyldfólk, men hon hittir tó mannin, sum hon elskar og giftur seg við honum. Tey bæði leita framhaldandi, men til fánýtis. Ofta verða tey vónsvikin á longu ferðini, og tey bæði fjakka úr eini legu í aðra, í jagstranini eftir einum øðrum lívi, sum ætlandi skal verða í Ameriku, har tey vilja hava fyrsta barn sítt.

### Senda bert um dagin

Seinastu vikuna ella so, hevur Rás 2 ikki sent um náttina, soleiðis sum ætlanin annars var. Mong vóru helst tey, sum gleddust yvir, at tað alla tíðina var gjørligt at lurta eftir tónunum frá FM 102.

Hesi verða tó ikki við sviðið soð, tí frá stjóranum á Rás 2, Suna Jacobsen, frætta vit, at hetta er orsakað av, at teir í løtuni eru í ferð við innleggingararbeiði.



Hetta arbeiði krevur, at øll tøknin á støðini er sløkt, og tí er avgjørt, at hetta arbeiði skal fara fram um náttina.

Talan er rættuliga umfatandi arbeiði, men gongst sum ætlað, verður aftur farið at senda um náttina um einar tríggjar mánaðir ella so.

## ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Heildin manglar

**Marna Jakobsen, exam. art., skrivar**

Útlondini og teirra viðurskifti eru ikki løtt at fáa eyga á í føroyskum fjølmiðlum. Av øllum illum er Útvarp Føroya frægast, tá ið tað snýr seg um uttanlandatíðindi. SvF hevði t.d. bert eini tíðindi úr útlondum sunnukvøldið, tey vóru um Eysturríkið, restin var um okkara egnu viðurskifti. So skalt tú kunnað teg um hvat gongur fyri seg úti í stóru verð, er tú noydd at keypa útlendsk bløð ella lurta eftir útlendskum útvarpi/sjónvarpi. Tað skal tó sigast, at sjónvarpið sendir *Globus* týskvøld, hesu ferð um Eysturríkið og nýggju høgravendu stjórnina har. Eg haldi, at útvarpið manglar eina slíka sending, sum viðger uttanlandaviðurskifti meira djúptgangandi.

Lurtar tú gjølla eftir tíðindunum í útvarpinum, og tað gert tú, tá ið tú skal ummæla, so fært tú varhugan av, at útvarpsfólk mangan gloyma seg sjálvi burtur og fara aftur á barnagarðsstøði. Eitt dømi av mongum var nú í vikuni, tá útvarpið greiddi frá, at Finnland hevði fingið kvinnuligan forseta, hesi stórtíðindi endaðu gudhjálpitúmær við, at útvarpsmaðurin greiddi okkum frá, at forsetin átti barn uttan fyri hjúnalag, var fráskild, men gekk saman við grannanum, møguliga misskilti eg hetta við grannanum, men álvaratos: hvat rakar hetta okkum? Er tað slatur eg vil hava, so kann eg fara yvir í kioskina hjá Karli at keypa Ekstra Blaðið ella Oyggjatíðindi, kanska mær eydnast at hoyra onkra saftiga á vegnum eisini.

### Kjakast nógv

Tað trýtir ikki av kjaksendingum í hesum landinum. Útvarpið hevur *Fimmaran* og sjónvarpið *Krosskast*. Tað eydnaðist mær ikki at hoyra *Fimmaran* hesu ferð, men *Krosskast* sá eg, og eg má viðganga at eg fái sveittan út, hvørja ferð eg hyggi at *Krosskasti*. Hesi neyðars menniskju verða hurraði inn og út úr sjónvarpsstovuni, eina løtu sita tey við borðið, so hvørva tey, so koma tey hann náði okkum inn aftur og sita tá á einum øðrum stóli. Altso bestemmi tykkum og ruddið upp har inni, hasar avískloddarnir treingja til at verða útskiftir. Evnið í *Krosskasti* var um ferðslu, uppleggið var at í Føroyum doyggja alt ov nógv ung í ferðsluni í mun til onnur Norðurlond. Hetta var evnið og átti eisini at verið evni, men ístaðin verður tosað um alt ímillum himmal og jørð, líka frá fartelefonum til uppskot um nýggja ferðslulóg. Øll evnini eru sannuliga viðkomandi, men ikki ber til at viðgera øll í senn. Tað eydnaðist eisini politikara aftur hesu ferð at tosa um andstøðu kontra samgongu, ístaðin fyri at geva boð uppá hvat hon helt átti at verið gjørt. Tí tað var hetta Jón Kragesteen eftirlýsti: At politikarar koma við einari heildarfatan av ferðslu.

Tað var eisini einum slíkum útspæli frá politikarum, Carl Johan Jensen bað um í *Innskoti* mánakvøldið. Her snúi tað seg um bókmentir, og eg haldi at hetta var ein fín sending, har C. J. Jensen greitt fekk fram, hvat hann helt um føroyskan mentunarpolitikk. Ólavur Rasmussen dugir sera væl at práta við fólk og fáa tað besta fram í teimum.

So løgið tað ljóðar, var tað sama útspæl, stjórin í Strandferðsluni eftirlýsti í sendingini *Føroyar og Framtíðin*. Hvørjar langtíðarætlanir hava politikarir við hesum øki. Ein sending eg lurtaði eftir við áhuga, eg eri bygdakona og havi brúk fyri Strandferðsluni. Bæði postverksstjórin og strandferðslustjórin gramdu seg um, at teirra „flutningstól" vóru ov gomul, miðalaldurin á arbeiðsfólkunum á postverkinum var 50 og elstu skipini hjá Strandferðsluni vóru millum 40 og 70 ár.

### Eisini til gamans

Undirhald er sum kunnugt nógv av. *Basalt* sunnukvøldið var í høvuðsheitum undirhaldandi. Sendingin var í tveimum, fyrri partur um Gulla, sum spælir trashtónleik fyri at røkka teimum ungu við tí kristna boðskapinum. Her vil eg lasta teimum, sum gjørdu innslagið, fyri ikki at viðgera tónleikin og kristniboðanina, men í staðin gjørdu hetta til eitt persónligt bekennilsi, sum eg kundi fari á møti og lurta eftir, um eg vildi tað. Har vóru eisini nakrar yvirsmartar effektir við krossi og illamanshøvdi, men eg var ikki imponerað. Seinni partur var um Gudrun Ludvig, designara, og tað var áhugavert. Vøkur pløgg og góð myndatøka, eitt pluss til Bjarna Rubeksen. Vit hava nógv kreativ fólk í hesum landinum, men umstøðurnar at virka eru so sum so.

Umstøðurnar hjá Sjónvarpi Føroya tykjast vera vánaligar. Týskvøldið fættist, at sjónvarpsstjórin hevði sagt starvsfólki upp. Sjónvarpið er dýrur, men neyðugur miðil í hesum landinum. Vit hava trý útvørp, men bara eitt sjónvarp, sum haraftrat kikkar eftir ondini av peningatroti. Hesin kassi, sum stendur í hvørjum heimi í Føroyum, má fáa betri umstøður at arbeiða undir.

Kórsang dámar mær sera væl, so eg havi lurtað eftir sendingini *Sálmar og sangir*, sum nú hevur verið um Hans Jacob Højgaard kórleiðara. Ólavur Hátún hevur skipað fyri, og har er hann á heimavølli. Lat meg tó siga at besta undirhald fært tú úr sendingini *Náttarravnar* leygarkvøld. Góður tónleikur, skemtiligir vertir og stuttligar telefonsamrøður, men prikkurin yvir i'num er Høgni Djurhuus útvarpskona, ein herligur kverulantur, sum torir at geva okkum ein beint framman á.

Um eg nú varð biðin um at velja bestu sending hesa vikuna, so hevði eg uttan iva sagt *Tilvera* hjá Armgarð Arge. Hon var um bróstkrabba, og hetta var ein tankavekjandi og upplýsandi sending. Eitt stórt ug frá mær.

ÚTsjón — Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN